Einasta blaðið **5** ferðir um vikuna

tíðindablaðið
# sosialurin
Telefon **11820** Telefax **14720**

Tíðindi, lýsingar, sjónarmið, orðaskifti, myndir – bert ein partur av tí, tú finnur í blaðnum...

## veðrið

Lágtrýstið yvir Norðurskandinavíu rekur spakuliga í landsynning og kalt luftrak við æl-ingi verður norðaneftir móti Føroyum. Hátrýstið yvir Landsynningsgrønlandi stendur mestsum í stað. Ein geiri háðani, sum friggjadagin snarar inn yvir Føroyar, elvir eitt skifti til støðugt veður á okkara leiðum.

Mikud. & hosdagin



At byrja við stívt andøvsgul upp í struk í vindi, 8–13 m/s, síðan minkandi til millum gul og stívt andøvsgul, 5–10 m/s, framvegis av norði. Lutvíst adrigið, kavaælingur, annars gott sýni og eisini sólarglottar. Hitin alt tíðarskeiðið av frostmarkinum niður í 5 kuldastig.

Friggjadagin
Bert upp í gul, 5 m/s, av norði at byrja við, seinni av ymsum ættum, rættuliga klárviðrað og mestsum einki ávfall. Hitin av frostmarkinum niður í 5 kuldastig.

Leygardagin
At byrja við bert upp í gul, undir 5 m/s, helst av ymsum ættum, klárviðrað og einki ávfall, seinni friskandi til millum stívt andøvsgul og hvassan vind, 10–15 m/s, av landsynningi, adrigið og kavaælingur sum frálíður, annars gott sýni. Tað verður lýggjari, upp í 2 stig.

Sunnudagin
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind, 10–15 m/s, millum landsynning og landnyrðing, adrigið, stundum kavaælingur, annars gott sýni. Hitin millum 1 og 5 stig.

*Bretskur blaðmaður í Føroyum at skriva um olju og mark:*

# Hvussu teir stóru traðka á teir smáu

*Bretsk bløð er farin at vísa Føroyum størri og størri ans. Hetta kemst bæði av støðuni, sum hevur tikið seg upp millum Føroyar og Danmark, men eisini markna-trætan hevur stóran áhuga. Og sjálvandi er grindaspurningurin altíð aktuellur*



*Eduard Pilkington, blaður á The Guardian vitjar á Sosialinum. mynd kalmar*

Hesa seinastu tíðina hava Føroyar fingið rúmt í bretskum fjølmiðlum upp á annað enn bert grind. Viðgerðin av grindamálinum hevur so heldur ikki verið serliga positiv mótvegis føroyingum.

Nú ósemjan um markið er komin upp á politiskt støði og tosað verður um at fara til Haagdómstólin við málinum eru fleiri bretsk bløð farin at vísa Føroyum ans.

Eitt teirra er tað sera væl-mtokta og seriøsa dagblaðið "The Guardian".

Blaðið hevur sent ein av journalistum sínum til Føroya at skriva um hesi viðurskiftir umframt ymiskt annað.

Blaðmaðurin eitur Eduard Pilkington og vitjaði í gjár oljutyrlsitingina.

Hann nýtti eisini høvi at stokka inn á gólvið á Sosialinum.

Eduard Pilkington sigur, at blað hansara hevur gjørt lítið burtur úr føroyskum viðurskiftum, men nú marknasamráðingarnar eru komnar á eitt vegamót og nú ilstøða hevur tikið seg upp millum Føroyar og Danmark vilja teir gera nakað við hesi málini.

Hann vónar at fáa eina grein við í blaðið í dag um marknatrætuna, tí hetta er rættiliga aktuelt í Bretlandi, nú Douglas Hurd, uttanríkisráðharri skal hitta løgmann á máli um júst marknaðsemjuna í dag.

Hetta er eitt sera áhugavert mál, og eg rokni við, at tað hevur stóran áhuga millum okkara lesarar. Hetta ikki minst tí, at her er jú talan um, hvussu ein stór tjóð traðkar á eina minni tjóð sigur bretski blaðmaðurin.

Hann heldur eisini, at málið hevur stóran áhuga fyri lesarar teirra, nú marknaðsemjan við Føroyar er seinasti marknaspurningurin kring Bretland, sum ikki er komin upp á pláss.

Eduard Pilkington ætlar eisini at gera greinar um onnur evni og vil hann m.a. hava nakað at vita um aktuellu kreppuna millum Danmark og Føroyar. Hann vil eisini lýsa støðuna í Føroyum ikki minst avleiðingarnar av at so mong flyta av landinum.

Men sjálvandi fari eg eisini at trívast í grindaspurningin. Mong av bløðunum í Bretlandi hava lýst henda spurningin sera einvíst. Nú vil eg fegin sleppa at tosa við nøkur fólk í Føroyum, um hvussu stóran týdning grindin hevur havt fyri tey sigur blaðmaðurin, sum tí eisini hevði verið fegin, um onkur "grindafamilja", sum hann málber seg, setti seg í samband við seg.

Hann býr á Hotel Hafnia.

**jan**

**Blindastovnur Føroya**
hevur opið mánadag–friggjadag kl. 9–16.
Telefonir: 18222 og 19288.

## Vestfalskyrrindi

**7. februar:** Fyrra kvarter
**8. februar:** Mánin longst frá jørðini
**15. februar:** Fullmáni

| Dato | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Vestmanna-sundi | | Nólsoyar-firði | | Haraldssundi/ Leirvíksfirði | | Skúvoyarfirði/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fp. | ap. | fp. | ap. | fp. | ap. | fp. | ap. | fp. | ap. | fp. | ap. |
| 8. febr | 0057 | 1333 | 0257 | 1533 | 1148 | – | 0112 | 1348 | – | 1233 | 0012 | 1248 |
| 9. febr | 0210 | 1431 | 0410 | 1631 | 0025 | 1246 | 0225 | 1446 | 0110 | 1331 | 0125 | 1346 |